gult cyan magenta svart

Okur eru føroyameistarar

Tá dómarin bríksla›i dystin millum B36 og VB av, var ta› greitt, at vágbingar fyri fyrstu fer› í søguni hava vunni› bestu mansdeildina

JÁKUP MØRK

VB kom til Gundadal vi› eittans endamáli leygardagin. Kravi› var tr‡ stig, og at vónirnar um stigini vóru gó›ar, var einki at ivast í. Hundra›tals vágbingar høvdu at kalla hertiki› gamla sk‡li›, og longu hálvan tíma undan dystinum, hoyrdust stu›ulsróp teirra oman til leikararnar, me›an hesir hita›u upp.

Sjáldan – um nakrantí› – hevur frøin í HB sk‡linum veri› so stór eftir eitt B36 mál

Mynd: Álvur Haraldsen

18 var eydnutali›

Longu undir upphitingini var sjónligt, at vágbingar tóktiskt meira enn vanliga uppsettir at vinna dystin. Hetta kom eisini rættiliga skjótt til sjóndar í dystinum. Fyrstu løtuna var talan kanska ikki so nógv um flótandi fótbóltsspæl, men ta› var bit og vilji í hvørjari takling, og serliga í verjupartinum tóktist vágbingarnir at fáa fatur í tí mesta fyrstu løtuna.

Klokkan mundi vera um at fara av teimum 18 minuttunum, tá ásko›arafjøldin brádliga leg›i nøkur desibel afturat áhaldandi rópunum. Su›uri úr Sumba frættist, at sumbingar høvdu lagt seg á odda móti HB, og tekin vóru nú í sól og mána um, at dagurin skuldi ognast Vágs bygd.

Alt me›an VB ásko›ararnir solei›is fagna›u sumbingum, gjørdu teir úti á vøllinum sítt til, at ta› ikki skuldi vera ney›ugt at ansa eftir, hvussu stø›an laga›i seg í Sumba. Milan Kulic vann bóltin av B36 verjuni. Hann stakk bóltin ví›ari til Robert, sum sn‡tti Herbert á›renn hann sera køli› lyfti upp um málverjan og yvir í handara sí›unet.

Um ta› var lei›lsumáli›, sum vi›førdi hetta, er ilt at siga, men restina av fyrra hálvleiki hev›i B36 hug at taka meira yvir.

VB var› tr‡st langt aftur á vøllin, og ta› var eisini heilt nær vi›, at B36 fekk okkurt máli›. Nærmast mundi Jens Kristian vera, men í fyrstu atløgu bjarga›i Bjarni Johansen knallhar›a stútaranum, og tá returin skuldi sparkast inn, vóru beinini hjá Jens Kristiani akkurát ov stutt.

Tróndur var fyri

Tá li›ini bæ›i fóru til hálvleiks, var ta› framhaldandi bert eitt mál á muni.

Ein kundi kanska rokna› vi›, at B36 tr‡sti› fór at gerast størri í seinna hálvleiki, tí enn høvdu teir bronsumerkini at spæla fyri. Harafturat kundi eisini roknast vi›, at tr‡sti› á vágbingum fóru at geva teimum gummibein, men hetta hendi als ikki.

Ísta›in fekk VB nú aftur nógv betri tak um dystin, og fyrsta korteri› av seinna hálvleiki høvdu teir allar møguleikar at avgera dystin. Tróndur Vatnhamar, sum eisini var ein av høvu›smonnunum hjá B36 fyri viku sí›ani, toga›i tó fleiri gó›ar bjargingar fram, VB-lei›slan ikki var› økt.

Fyrst bjarga›i hann einum gó›um skoti frá Tór›i Holm, eftir at leikandi venjarin hev›i lagt út frá baklinjuni. Løtu seinni var venjarin aftur upp á spæl, tá hann leikti Robert Cieslewicz leysan, men hesin sendi vi› sí›una av.

Løtu seinni vóru leiklutirnir skiftir, tá Robert spældi Krzystof leysan, men enn einafer› fekk Tróndur vart fyri, og tá leikandi venjarin so seinni fekk alla B36 hálvuna at renna á, var› hann í fyrstu atløgu takla›ur av málverjanum, sum eisini bjarga›i, tá Milan Kulic gjørdist leysur vi› returinum.

Ta› kann tí ikki á nakran hátt sigast at vera óuppibori›, at VB um mi›jan hálvleikin kom upp á 2-0. Hetta hendi, ta Milan sendi høgan bólt úr vinstru inn um B36 verjuna.

Krzystof Popczynski var fyrstur á, og tá Tróndur var komin naka› úr málinum, lyfti leikandi venjarin, so bólturin í einum bleytum boga fer›a›ist í B36 máli›.

Ásko›ararnir vóru á gosi›, leikararnir lógu allir í einum trunka og fagna›ust, og hesa løtuna mundi eingin vera í iva um, at VB skuldi gerast føroyameistari í bestu deildini fyri fyrstu fer› í 95 ára gomlu søgu felagsins.

HB húsi› fagna›i B36

Seinni helmingurin av seinna hálvleiki gjørdist tó meira spennandi, enn flestu VB vi›haldsfólkini bríggja›u seg um.

Tá tíggju minuttir vóru eftir at leika, eydna›ist ta› nevnliga júst innskifta Bjarna Prior at minka um munin, tá hann brádliga gjørdist leysur í brotsteiginum.

Sjáldan munnu HB vi›haldsfólkini hava fagna eini B36 skoring somiki› nógv, og fagna›urin gjørdist ikki minni, tá Tróndur naka› seinni aftur framdi eina fantom-bjarging, tá Robert Cieslewicz royndi seg áraka brotssparksblettinum.

Fyri viku sí›ani var ta› úr B36 húsinum, at fagna›arrópini dundu ni›ur til málverjan, men hesu fer› var ta› úr HB húsinum.

Seinastu løtuna royndi B36 at flyta alt meira fólk fram á vøllin, me›n VB hinvegin tók seg aftur, fyri at halda fast um lei›sluna. Talan mundi í fleiri førum veri › um spentar stø›ur, men rættuliga vandamiki› gjørdist ta› onganti›.

Tá dómarin so loksis blásti dystin av, var allur Gundadalur á gosi. Leikararnir vóru algoystir, ri›ilin av ásko›arum tusti inn á vøllin, og me›an Freddy Mercury, sáli, lat tónarnar av »We are the champions« runga úr hátalarunum, hálsfevndust og klemma›ust tey inni á vøllinum.

Ongantí› hevur eitt li› bí›a› so leingi eftir einum meistaraheiti›, og hóast hini níggju li›ini royndu ta›, sum tey vóru ment, at ste›ga vágbingunum, so munnu FM-krónurnar vera vágbingunum væl untar.

B36:
Tróndur Vatnhamar – Karl Leonsson, Egil Zachariassen, Herbert í Lon Jacobsen – Klæmint Matras, Rógvi Róin, Jan Guttesen, Jens Kristian Hansen, Dánjal Petur Johansen – Jákup á Borg, Magni á Lakjuni

VB:
Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Ey›un Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Tór›ur Holm, Kjærbo, Milan Kulic, Jón Pauli Olsen – Krzystof Popzynski, Robert Cieslewicz.

Robert Cieslewicz setti VB á sigurskós, tá hann í 19. minutti sn‡tti Herbert, á›renn bólturin var› sendur í meskarnar

Mynd: Álvur Haraldsen

Undan dystinum savna›ust allir VB ásko›ararnir í Kommunuskúlagar›inum, ha›ani teir í samla›um fylgi fóru ni›an í Gundadal

Mynd: Álvur Haraldsen

Málveitsla á Svangaskar›i

Lítil dentur var› lagdur á verjupartin í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki bundu gøtumenn, sum ikki hava tapt á Toftum sí›ani 1989 fyri, og so vunnu teir stórt

Ta› var sera málríkt á Svangaskar›i leygardagin. GÍ vann 7-3, og ta› sigur ikki so líti› um, hvussu nógvur futtur var í, at stø›an var 3-3, tá fyrra umfari› var hálvrunni›.

Teir á heimali›num royndu í 1. hálvleiki at vísa rætta hugbur›in, og ta› eydna›ist teimum tríggjar fer›ir at koma framum. Men gøtuenn komu hvørja fer› afturíaftur beinanvegin. Sjálvt um B68 tríggjar fer›ir var frammanfyri, so vóru teir tilsaman ikki frammanfyri í meiri enn seks minuttir.

GÍ kom framum stutt undan ste›ginum. Tá li›ini komu á vøllin eftir ste›gin, tóktust toftamenn ætla sær at fáa tak á aftur. Men ta› gekk bara ein lítil løta, á›renn GÍ hev›i økt til 5-3, og so var li›ugt hjá B68, sum hev›i ilt vi› at finna rættu stø›urnar til mótstø›umenninar. GÍ var rættuliga álopsrætta› í 4-3-3 útgangsstø›u, har Magni Jarnskor, Helgi L. Petersen og Súni Olsen manna›ur fremstu plássini.

Gongur ta›, sum Súni Olsen ætlar, so spældi hann fyri sí›stu fer› í hesum umfarinum vi› GÍ. Nú skal hann n‡ta fótbóltsevnini, sum eru ment í GÍ, í Hollandi. Farvæl heilsanin til barndómsfelagi› var ikki so galin, tí Súni Olsen skora›i tr‡ mál, og í fleiri ø›rum førum átti hann næstsí›sta fótin.

Málini

1-0: 7. min. Marlon Jorge leggur innfyri úr høgru, og Súni Frí›i Johannesen setur krúllin undir bóltin.

1-1: 10. min. Súni Olsen fer til baklinjuna í vinstru, leggur úr frá, og n‡ggi mi›vallarin, Poul Henning Jacobsen smekkar til av brotsteigarmarkinum.

2-1: 14. min. Øssur Hansen fer til baklinjuna í vinstru, GÍ verjan er tøvandi, tí teir halda, at talan var um rangstø›u. Súni Frí›i Johannesen er fyrstur á flata innlegginum.

2-2: 16. min. Toftamenn hava ikki fingi› armarnar ni›ur um høvdi› aftur, tá Súni Olsen smekkar flatt úr vinstru og í handara sí›uneti›.

3-2: 21. min. GÍ málverjin tr‡stir Marlon Jorge ni›ur, dómarin bríkslar fyri brotssparki, og Súni Frí›i Johannesen tekur uppgávuna á seg. Hesa fer› er hann tryggur úr ellivu metrum.

3-3: 22. min. Aftur eru toftamenn ikki nóg ansnir beint eftir, at teir hava skora›. Máli› er endurtøka av 1-1 málinum. Súni leggur upp, og hesa fer› er Hans Pauli Petersen avrættarin.

3-4: 43. min. Magni Jarnskor lyftir inn um B68 verjuna. Toftamenn halda, at Helgi L. Petersen er rangstaddur. Ta› halda linjuverjin og dómarin ikki, og so er lætt hjá Helga at snei›a framvi› málverjanum og trilla bóltin í máli›.

3-5: 50. min. Hallur Hansen sendir langt útspark fram á B68 hálvuna. Fleiri verjuspælarar og B68 málverjin halda seg at hava tak á, inntil Magni Jarnskor leypur til og vi› høvdinum snittar upp um málverjan.

3-6 og 3-7: Súni Olsen sta›festir rimmar GÍ sigurin í 54. og 62. minutti. Í seinna førinum er púra útselt hjá toftamonnum. Helgi L. Petersen hevur bóltin og spælir líti› sjálvsøki tvørturum til uppaftr leysari Súna Olsen, sum takkar fyri.

jh

Heldur ikki hesu fer› eydna›ist ta› toftamonnum at vinna heimadystin móti GÍ

Mynd: Sofus

B68:
Magnus Poulsen – Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Oleif Joensen – Marlon Jorge, Ey›stein Skipanes, Fró›i Benjaminsen, Øssur Hansen, Jákup Djurhuus – Súni Frí›i Johannesen, Marcello Marcellino

GÍ:
Hallur Hansen – Poul Ennigar›, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Jóan Petur Olsen, Poul Henning Jacobsen, Áslakur R. Petersen – Magni Jarnskor, Helgi L. Petersen, Súni Olsen.

HB gav ÍF lítla mótstø›u

2. deild:
ÍF hev›i undan dystinum tryggja› sær at spæla uppflytingardyst, og tí fingu fleiri av teimum ungu møguleikan at royna seg, og teir komu væl frá uppgávuni. ÍF vann stórt á HB. 6-1 var úrsliti›

STEFAN Í SKORINI

Ta› sást beinanvegin, at hetta vóru li› í hvør sínum enda á stigatalvuni, sum møttust í Fuglafir›i. Ta› bragda›i tó ikki av álvara hjá fuglfir›ingum fyrr enn í seinna hálvleiki.

Av tí at dysturin ikki var av nøkrum t‡dningi hjá ÍF, hev›i venjarin gjørt av at geva nøkrum av teimum ungu, sum vanliga ikki fáa nógva spælití›, møguleikan at royna seg á besta li›num. HB hev›i hinvegin ikki tryggja› seg í næstbestu deildini, men hini úrslitini laga›u seg so, at teir ikki skulu spæla ni›urflytingardyst, tí teir enda›u á tri›ni›asta plássi.

ÍF leg›i seg framum beinanvegin. Hornaspark var› sent tætt innfyri máli›, har Kaj Leo, sum var› hart tr‡stur av fleiri ÍF-arum, ikki fekk beint bóltin burtur men ísta›in í egi› mál. Dyggur smeitur at fáa so tí›liga í dystinum.

HB svara›i tó aftur eitt sindur seinni. Fyrrverandi ÍF spælarin Ey›un Samuelsen fekk fatur á bóltinum frá ÍF verjuni og setti beina kós móti málinum, har hann gjørdi útjavnandi máli›. Hetta máli› tryggja›i honum sæti› ovast á máltindinum vi› 14 málum.

ÍF leg›i seg tó framumaftur fyri ste›gin, tá Kaj Leo ikki megna›i at halda einum skoti, og John Thomsen var skjótur at beina bóltin í neti›. John Thomsen spældi annars ein fínan dyst í álopinum hjá heimali›num.

Eftir ste›gin megna›i HB ikki at fylgja vi› meira. Ken Bærendsen sendi fyrst eitt beinlei›is fríspark í máli›. Hann var staddur naka› frá sí›ulinjuni, tá hann sendi frísparki› hart og flatt móti málinum. Ímillum vinir og fíggindar fer›a›ist bólturin beina lei› í máli›. Fjór›a málinum stó› Høgni Zachariassen fyri. Hann var ein av nøkrum unglingum, sum vóru á vøllinum allan dystin. Høgni dróg framvi› fleiri av teimum gomlu og garva›u verjuni hjá HB. At enda runda›i hann eisini Kaj Leo og trilla›i í kassan.

Tvey mál komu móti endanum av dystinum. Fyrst var ta› Ey›olvur Petersen, og sí›ani Rúni Petersen, sum eisini sluppu at skjóta mál.

Næsta uppgávan hjá ÍF ver›ur torførari enn tann móti HB. FS Vágar ver›ur mótstø›uli›i›, og tey skulu dystast um ta› seinasta plássi› í 1. deild komandi ár. Hetta ver›ur ein sera stórur biti hjá ÍF at gloypa, men teir fara óiva› at gera alt fyri at endurvinna sæti› í bestu deildini. FS Vágar hinvegin hevur fleiri heilt gó›ar spælarar. Eisini hava vágamenn víst, at teir kunnu bíta frá sær av álvara. Hetta bera sigrarnir á B68 og GÍ bo› um. Næstu vikurnar fara siga okkum, hvørt ta› ver›ur FS Vágar ella ÍF, sum skulu spæla í 1. deild komandi ár.

ÍF-HB 6-1 (2-1)
1-0: Sjálvmál
1-1: Ey›un Samuelsen
2-1: John Thomsen
3-1: Ken Bærendsen
4-1: Høgni Zachariasen
5-1: Ey›olvur Petersen
6-1: Rúni Petersen

Súni Frí›i enda›i ovast

Nú er ta› greitt, at bá›ir skarprættararnir hjá B68 aftur komandi ár fara at spæla á Svangaskar›i

Súni Frí›i Johannesen gjørdist toppskjútti í bestu deildini. Hann skora›i øll tr‡ B68 málini leygardagin, og harvi› fór hann so at siga á málstrikuni framum Marcello Marcellino. Súni Frí›i er skrásettur fyri sekstan mál í ár, og Marcello er skrásettur fyri fimtan mál. Tilsaman hava teir bá›ir skora› 31 av teimum 43 málunum, sum B68 fekk í júst lokna kappingarárinum.

Og ta› eru líkindi fyri, at teir bá›ir fara at skora fleiri mál fyri B68. Í morgin farra teir bá›ir brasiliumenninir á Toftum, Marlon Jorge og Marcello Marcellino, til hús í vetrarfrí. Teir hava bá›ir skriva› undir n‡ggja avtalu vi› B68. Teir skulu vera aftur á Toftum 1. mars.

Vit skilja á lagnum, at fleiri feløg hava spurt eftir teimum bá›um málslúkunum hjá B68, men teir fara ongan veg. Súni Frí›i Johannesen hevur eisini skriva› undir n‡ggjan sáttmála, og so er spurningurin, nær toppskjúttin í ár og í 1995 fer at runda mál nummar eitt hundra›.

Higartil hevur Súni Frí›i skora› 95 mál í landskappingardystum í 1. deild. Besta ári› var í 1995, tá hann skora›i 24 mál. Næstbesta ári› var í 1998, tá HB gjørdist meistari, m. a. tí Súni Frí›i skora›i 18 mál. Ta fer›ina var Jákup á Borg toppskjútti í bestu deildini vi› 20 málum.

B36 hevur skora› flest mál í bestu deildini. Málini eru b‡tt út á nógvar spælarar. Jákup á Borg er toppskjútti í B36 vi› sjey málum. jh

Máltindurin 1992-2000

1992:	Símun P. Justinussen GÍ 14 mál
1993:	Uni Arge HB 11 mál
1994:	John Petersen GÍ 21 mál
1995:	Súni F. Johannesen B68 24 mál
1996:	Kurt Mørkøre KÍ 20 mál
1997:	Uni Arge HB 24 mál
1998:	Jákup á Borg B36 20 mál
1999:	Jákup á Borg B36 17 mál
2000:	Súni F. Johannesen B68 16 mál